VALGREINAR

Felags foreldrarætt

Finnur Helmsdal
tjóðveldisflokkurin

Tá fólk skiljast ella velja at fara hvør til sítt, byrja alt ov ofta ein drúgvur og ikki altíð líka tepiligur dystur um børnini. Fyrst um rættin til at hava tey hjá sær, og síðan um rættin til samveru við tey. Tað er altíð bara annar parturin (oftast mamman), sum fær rættin at hava børnini hjá sær. Hin parturin (oftast pápin) fær so samverurætt við síni børn. Av tí at familjurættarliga økið er danskt, er tað Ríkisumboðið sum ásetur í hvønn mun samveran skal vera.

Viðurskiftini millum tey, sum eru farin hvør frá øðrum, merkja viðurskiftini viðvíkjandi samverurættinum. Mangan er illstøða millum tey, sum skiljast, og sæst hendan tíverri alt ov ofta aftur í samband við útinnanina av samverurættinum. Stóri taparin í hesum spælinum er tíverri barnið alla børnini. Um foreldrini vilja tað ella ikki, so verða børnini mangan gíslar í haturskendum stríði millum tvey, ið eina ferð hildu seg elskað hvørt annað. Børn, í slíkari støðu, fáa ikki bara ringar og ræðandi upplivingar, tey eru í størsta vanda fyri at fáa sálarligar løsir, sum kunnu merkja og fylgja teimum restina av lívinum.

Tað ber ikki til at lóggeva móti ósemjum og skibbrotnum paraløgum, men tað ber til at lóggeva soleiðis, at viðurskiftini kring foreldrarættin verða nógv greiðari. So hóast tað ikki enn hevur eydnast at taka yvir familjurættarliga økið, eiga vit at seta í verk felags foreldrarætt í Føroyum. Og tað skulu vit gera sum skjótast.

Uppruddingin verður stór

Heðin Mortensen
valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy

Álit, áræði og framburður eru lyklaorð, tá talan er um politikkin hjá Sambandsflokkinum, ið alla sína tíð hevur verið ein borgan fyri, at Føroyar hava verið eitt liviligari samfelag hjá øllum.

Fyrr hevur Sambandsflokkurin roynst hollur, tá brúk hevur verið fyri einum ábyrgdarfullum og álítandi flokki at tikið upp eftir kollsigldari manning í Tinganesi.

Enn í dag stendur Sambandsflokkurin fyri tí sama, og enn eina ferð er flokkurin til reiðar at taka við landsins leiðslu, so vit aftur kunnu skoða ein nýggjan dag og sleppa burtur úr mjørkatáminum, ið hevur hingið tungt yvir landinum hesi fimm árini, politikkur hevur verið skiftur út við fullveldisørskap.

Jú, uppruddingin verður stór, men vit fáa ongantíð ov skjótt gjørt hana burtur av okkum, so sleppast kann víðari.

Vit kunnu ikki liva við, at hesi bæði fárnu landsstýrini hava vent øllum á høvdið, so tí ræður um at fáa eina munadygga leiðslu í landinum, ið kann tryggja vælferð og eitt gott samfelag fyri øll.

Ikki lova vit gull og grønar skógir, men vit lova at taka uppgávuna í fullum álvara, tí tað krevst. Sambandsflokkurin torir at taka avgerðirnar, ið fáa landið á føtur aftur.

Skulu vit øll vera saman um at taka hetta stóra tak fyri land og fólk, er neyðugt við stuðli á løgtingsvalinum komandi, tí tað er bara við fólkinum aftan fyri seg, at vit fáa stungið út eina trygga kós fyri framtíðina!

Alivinnan skal ikki stýrast politisk

Heðin Dánialsson Poulsen
valevni Fólkafloksins í Suðurstreymoy

Fleiri eru tey, ið eru á einum málið um, at ein av orsøkunum til kreppuna í hálvfemsunum var, at politikarir royndu at stýra vinnuni í smálutum. Hóast hesa staðfesting, er tað framvegis soleiðis at alivinnan verður stýrd politiskt, hetta er ikki rætt og má fáa ein enda, áðrenn alivinnan ikki sjálv tekur ein enda vegna ov nógva politiska úppiblanding.

Alivinnan er ikki ein sunn vinna í dag, og kemst hetta av fleiri orsøkum, men sum bæði vinnan og figgjingarstovnarnir hava staðfest, so eru teir flestu trupulleikarnir hjá alivinnuni orsaka av tí vánaligu lóggávu alivinnan skal virka undir.

Tveir trupulleikar, ið tey ráðandi lættliga høvdu kunnað broytt, var viðvíkjandi upprunanum av eginpeninginum og loyvi at seta sjálvt aliloyvið í verk.

Tá nú bæði figgingarstovnarnir og alivinnan við ein munn úttala seg um, at alivinnan tørvar upp til 200 milliónir í eginkapitali og at hesin kapitalur einans kann koma uttanlands frá, hví so ikki broyta ásetingina um at 2/3 av kapitalinum skal koma úr Føroyum? Hvat er hetta fyri hugsunarháttur, øll onnur lond liggja á knøum fyri at fáa íleggjarar úr øðrum londum at koma til teirra land við pengum at seta í vinnulívið, men ikki her; her vísa vit teimum durafjórðingin. Partarnir hava sagt, at uttan eina hækkan í eginpeninginum verður eingin nýggj figging og uttan figging stendur øll tann føroyska alivinnan at fara í søguna.

Ein onnur forðing fyri menning innan alivinnuna er, at aliloyvir ikki kunnu setast í við sum onnur vinnugøgn. Henda forðing, sum hevur verið fullkomuliga burtur úr vón og viti, ið ber brá av eini smáluta politiskari stýring við manér, er tó nú komin til lívs, ikki tí tey ráðandi vildi vísa vilja, nei, tí vinnan mátti sjálv stevna og vinna sín rætt hjá domsstólunum.

Alivinnan skal ikki stýrast av politikarum, politikarar skulu syrgja fyri, at vinnan fær teir bestu karmarnir at virka undir og teir bestu karmarnir eru vinnufrælsi, frælsi at fáa til vega tann neyðuga eginkapitalin, har hann er at fáa og frælsi at veðseta aliloyvini, sum onnur virkisgørn.

Tiskil sigi eg tykkum, at tíðin nú er komin at lurta eftir ráðum frá teimum, sum vita hvat vinnuni tørvar og broyta treytirnar ella sígggja alivinnuna bløða út.

hedin@hedindp.com

Nýggj skipan fyri bátar undir 15 tons - bólk 5

Jacob Vestergaard
valevni Fólkafloksins í Suðuroynni

Vit eiga at taka teir minstu bátarnar í bólki 5 burturúr skipanini og lata teir sleppa at fiska frítt.

Tað verður neyðugt at broyta skipanina fyri smábátar undir 15 tons - bólk 5. Tað er burturvið, at hvør smábátur, sum bert avreiðir av og á, skal hava fiskiloyvi og fiska burturav ásetta dagatalinum og verða umsitin sum eitthvørt annað fiskiskip.

Hetta gevur stórar umsitingarligar trupulleikar, og er bólkur 5 tann sum mest kjak hevur verið um á Løgtingi, og tað sigur ikki so lítið.

Vit byrja at úthola fiskidagaskipanina, um vit lata allan bólk 5 fiska frítt, tí teir stóru bátarnir í bólki 5 eru blivnir sera effektivir, og ikki at tosað um, um markið verður sett til 30 tons, sum røddir eru frammi um.

Men vit eiga at taka teir minstu bátarnar í bólki 5, frá "seksaringi", tá tað snýr seg um opnar bátar, og tilsvarandi støddi, uml. 24-27 fót, tá tað snýr seg um dekksbátar, burturúr skipanini, og lata teir sleppa at fiska frítt.

Hesir bátar hava avmarkaða fiskiorku, og verða altíð darvaðir av veðri. Tað hevur tí lítla og onga ávirkan á stovnarnar, um hesir bátar sleppa at fiska frítt.

Samlaða dagatalið í bólki 5 kann so minkast ella javnstillast við teimum døgunum, sum teir smáu bátarnir hava brúkt.

Teir, sum so eru eftir í bólki 5, kunnu so býtast upp í „fult riknar", bólk 5A og "partvís riknar", bólk 5B, møguliga við broyttum treytum, í mun til tað, skipanin er í dag.

Hetta arbeiði var sett í gongd og ætlanin var at nýggja skipanin skuldi setast í verk 1. mars, tá nýggj loyvir skulu útskrivast til bólk 5.

Hetta og onnur arbeiðir vóru sett í gongd fyri at gera okkara fiskivinnu-umsiting einfaldari, og verður bert gjøgnumført, um Fólkaflokkurin aftur fær ávirkan á fiskivinnupolitikkin.

Veljið Fólkaflokkin, lista A.

Yvirtøkumál

Birgir Mohr
Sandi

Árligt yvirskot á løgtingsfiggjarlógini og ein rationalisera miðfyrisiting eru fortreytirnar fyri yvirtøkumálum og síðan fyrireiking og málkunnleiki.

Tá fullveldissamgongan rendi seg fastan niðri á Christiansborg á sinni, tá varð ein av fylgjunum, at aftur mátti farast til sama leist at yvirtaka mál fyri mál undir tað víðkaða føroyska sjálvstýrið.

Men ein onnur fylgja av harðligu samráðingunum har niðri var sera køld luft millum danska fólkatingið, donsku stjórnina og Føroya løgting og landsstýri og harav fórst tann økkum tørvandi vælvildin, vit fyrr høvdu møtt frá dønum. Størsti parturin av danska fólkinum og donsku fólkatingslimunum, tey skiltu okkum ikki – tí størri mótvilji. Hettar hevur merkt viðurskiftini síðan, tí fær fullveldislandsstýri ongar sømdir.

Atlíkavæl hevur nú kollsigldа landsstýrið hildið fram við og tann eini flokkurin heldur áfram undir valkampinum, at alt skal yvirtakast – eini 24 mál sigur hann vera púra greið at yvirtaka, mál sum kosta fleiri hundrað milliónir at yvirtaka og umsita árliga við eini løgtingsfiggjarlóg, sum longu nú gevur hall – takka verið ógvuliga niðurskurðin í blokkinum.

Men hettar verður ikki eftir valið. Tað skal raðfestast heilt øðrvísi. Vælferð og dagligdagur fólksins skal raðfestast fremst. Yvirtøkur, bert um vit hava pening og kunnleika tøkan.

Fleiri av málunum, sum Tjóðveldisflokkurin sigur vera greið til at yvirtaka, tey eru als ikki greið í veruleikanum kanska á pappírinum. Eitt er løgreglan og rættarskipanin. Har er einki greitt, uttan nakrar strikur á pappírinum.

Við eini løgtingslóg, sum gevur hall, er ikki pláss fyri yvirtøkum. Skulu stórmál, sum til dømis flogvøllurin í Vágum yvirtakast, so má avtalan samstundis hvussu er umfata eina útbygging og nútímansgerð at nøkta international krøv bæði til trygd og komfort.

Eitt nýtt landsstýri – sum kundi staðið betri í eygunum á donsku myndugleikunum – mátti kanska kunna samrátt seg fram til eina slíka loysn – so ella so at fáa pening til flogvallarábøturnar, um málið verður yvirtikið ella ikki.

Javnaðarflokkurin fer at raðfesta øðrvísi – yvirtøkur koma ikki at standa fremst, men fólkið fyrst – tað góða samfelagið skal varðveitast og betrast.

Veljið Javnaðarflokkin!

VALGREINAR

Tað, sum SVF klipti og Tobbi visti

Bill Justinussen

Ein viðmerking til orðaskiftið um eykajáttan Løgtingsins til serviðgerð uttanlands.

Mánakvøldið 22. desember hevði SVF eina samrøðu við undirritaða í Degi og viku viðvíkjandi tí, sum fór fram í tinginum og figgjarnevndini leygardagin 20. desembur. Samrøðan við SVF, sum var upptikin umborð á stásiliga gøtufarinum Finni Fríða, vardi umleið 1/2 tíma í upptøkurúminum, men neyvan meiri enn 2 minuttir í SVF. Altso vórðu leysliga mett einir 25 minuttir kliptir burtur. Bara tað, sum kundi undirbyggja fatanina av einum ábyrgdarleysum landsstýrismanni, var mett týdningarmikið av sjónvarpsfólkunum, tí søgan var, at landsstýrismaðurin hevði roknað 7 milliónir skeivt. Søgan varð smíðað áðrenn samrøðuan við undirritaða, og kundi tí bara tað nýtast, sum passaði til søguna. Søgan var bara ikki sonn, og skal eg tí greiða frá veruleikanum her.

Veruleikin

Føroya landsstýri, sum síðani 5. desembur hevur fingið heitið ein starvsstjórn, og sum er skert úr 9 niður í 5, var sera ivasamt um sína nýggju støðu í politisku skipanini. Ongantíð áður hevur hendan støðan verið undir nýggju stýrisskipanini, og tí var onki fordømi. Uppá fyrispurning frá Jenisi av Rana í tinginum 10. desember um, hvussu verður við eykajáttanaruppskotum fyri 2003, svaraði løgmaður, at eykajáttanarløgtingslógin fyri november liggur í tinginum, og er tað tí upp til tingið at viðgera hetta. Løgmaður metti, at landsstýrið hevði lagt síni tøl fram, og tí lá ábyrgdin hjá tinginum.

Ein royndi varð gjørd at viðgera hetta uppskotið í figgjarnevndini, men hósdagin 18. des fekk løgmaður at vita, at figgjarnevndarlimirnir ikki vildu viðgera eykajáttanarløgtingslógina fyri november. Hendan var annars væl gjøgnumarbeidd, og læt undirritaði tølini og útroknингarnar inn til figgjarmálaráðið longu 24. oktober 2003. Framroknингar vístu, at okkum tá komu at tørva umleið 9 milliónir í eykajáttan, um tiltøkini, sum vit hava arbeitt við seinasta hálva árið, vóru byrjað at gera sína ávirkan.

Tá figgjarnevndin vísti hesum uppskoti frá sær, var bólturin afturfur kastaður yvir á landsstýrið, og tí kallaði løgmaður í skundi inn til landsstýrisfund sama dag við einum tíma skotbráði; vit vóru jú bert 6 dagar undan jólum.

Nú varð avgjørt, at løgmaður sum virkandi landsstýrismaður í figgjarmálum varð noyddur at leggja eitt als ikki viðgjørt uppskot til eykajáttanarlóg fyri tingið í skundi. Á hesum landsstýrisfundi gjørdi eg vart við, at nú var støðan viðvíkjandi játtanini til serviðgerð uttanlands broytt í mun til upplýsingarnar frá 24. oktobur, tí nú kendu vit útreiðslurnar fyri november, og tær vóru munandi hægri, enn vit fyrr høvdu mett. Men nú var ikki tíð til at gera nakra broyting í uppskotinum, og tí var avrátt, at eg undir orðaskiftinum í tinginum skuldi upplýsa tingið um, at 9 milliónir ikki fóru at vera nóg mikið. Hetta gjørdi eg so skjótt, sum høvið var til tess, í eini viðmerking til Andrias Petersen. Frammanundan høvdu framsøgufólkini havt orðið, og tá hevur landsstýrismaður smb. tingskipanini ikki loyvi at gera viðmerkingar. Eg upplýsti, at leysliga mett fóru meirútreiðslurnar til serviðgerð uttanlands at vera 14 mió. heldur enn 9, tvs. ein samlað nýtsla uppá 83 mió.

Í figgjarnevndini

Vanliga fáa vit landsstýrismenn skrivliga boð um at møta í figgjarnevndini. Eisini fáa vit í góðari tíð at vita, hvørjum fyrispurningum, vit skulu svara, so embætisfólkini fáa ein rímiligan møguleika at fyrireika seg. Hendan leygardagin var alt øðrvísi. Eg fekk uml. kl. 13.00 munnliga at vita, at eg skuldi møta í figgjarnevndini. Leygardag eru embætisfólk vanliga ikki til arbeiðis, og tí var ongin fyrireikaður til at svara fyrispurningum.

Viðgerðin í figgjarnevndini var heilt óvanlig. Hon minti mest um eitt sjálvtøkuborð. Floksfor-menninir Jóannes Eidesgaard og Høgni Hoydal møttu fyri fyrstu og síðstu ferð í hesum valskeiði sum varamenn, og var viðgerðin nógv ávirkað av hesum. Spurt var um, hvussu nógv eg vildi hava. Hesum spurningi havi eg ikki áður møtt, og var eg satt at siga tikin av fótum eina løtu. Vanliga hevur tað verið øvugt. Formaðurin hevur tá hildið áhugaverdar fyrilestrar um týdningin av at halda figgjarlógina í teymum, og tí hevur viðgerðin vanliga snúð seg um at spara her fyri at brúka har.

Serliga var eg skelkaður av skrivaranum, sum átók sær ein heilt óvanligan og í mínum yegum óhóviskan leiklut í nevndini. Hann sat og zappaði inni á roknskaparskipan landsins og tyktist at vita munandi meiri enn landsstýrið. Eitt nú vildi hann hava okkum at gera greitt, um vit ikki eisini áttu at biðja um 3 milliónir útyvir tær 4 eyka, tí tað fekk hann burturúr roknskaparskipanini. Eg greiddi honum frá, at hesar 3 milliónirnar vóru nýtsla fyri 2002, sum av bókhaldstekniskum orsøkum vóru bókaðar uppá árið 2003, og tí hevði eg fingið at vitað, at eg ikki skuldi biðja um hendan pening fyri 2003. Ein ávís óvissa var nú um hendan spurningin, tí hann var í míni verð avgreiddur fyri langari tíð síðani, men hóast tað gjørdist endaliga niðurstøðan, at figgjarnevndin eisini vildi hava hesa upphædd við. Hetta var eg ikki glaður fyri, tí ní sига tølini, at nýtslan í 2003 er 86 mill., og tað er skeivt. Rætta talið verður helst einar 83 mió, møguliga lægri, alt eftir, hvat roknингin fyri desember verður. Tað fáa vit at vita uml. 15. januar.

Revsarin Tobbi

Undir 2. viðgerð í løgtinginum, sum var stutt eftir hendan sjáldsama figgjarnevndarfundin, átók Torbjørn Jacobsen sær tann revsandi leiklutin. Tað er hann vælkomin til, tað er sambært honum sjálvum ein av hansara uppgávum sum løgtingsmaður. Men tá hann leggur meg undir at hava hildið upplýsingum aftur fyri tinginum, fer hann skeivur. Eg upplýsti alt tað, eg visti.

Harumframt var Torbjørn saman við restini av tinginum longu í septembur kunnaður um, at einar 12 mill. fóru at resta í hesi játtanini fyri 2003, um ongin broyting kom í. So tað, sum hann ikki visti, visti eg heldur ikki.

Hendan kontan á figgjarlógini hevur mangar ferðir verið viðgjørd í tinginum, og allir tingemenn vita fullvæl, at her er talan um eina útreiðslu, sum vónleyst er at meta rætt um, tá árið byrjar. Ongin er førur fyri at siga, hvussu nógvir føroyingar komandi ár fara at fáa hjartatrupulleikar, fara at gerast langtíðar medisinskir sjúklingar, fáa krabbamein ella fáa brúk fyri gagntransplantatión osfr. Ein einstøk viðgerð kann kosta upp í 4 mió. kr. Bara tað svarar til ein heilan mánaða í vanligari nýtslu. Tí verður eftir besta førimuni mett um hesa útreiðslu hvørt ár, men sum oftast verður skotið væl við síðuna av. Tað nýggja er, at munandi meiri fokus hevur verið á hesa játtan enn áður, og tað er gott, tí talan er um eina stóra játtan á figgjarlógini, størri enn tey bæði smáu sjúkrahúsini tilsamans. Heldur ikki havi eg hoyrt tingfólk verið serliga atfinningarsom eitt nú í sambandi við hesa kontu fyri árið 2000, tá ein meirútreiðsla uppá 8 mió. kr. varð staðfest í landsroknskapinum uttan eykajáttanarumbøn.

Eg fari í aðrari grein at vísa á gongdina í útreiðslunum til serviðgerð uttanlands og hvussu eg sum landsstýrismaður havi roynt at stýra útreiðslunum á frægasta hátt.

Tíverri dugi eg ikki at greiða frá hesum máli við færri orðum, tí nøkur ting krevja eina gjølligari frágreiðing, um fatan fyri økinum skal skapast.

Tá aldurdómurin bankar uppá?

Thomas J. Askham

Fyri mong fólk, ið røkka upp í eftirlønaraldurin er hendan tíðin oftani samanbundin við eitt slag av stúran. Mangir spurningar treingja seg uppá hjá hesum bólki av kvinnum og monnum. Tey uppliva at hava nógva tíð til avlops, síðan tey søgdu arbeiðsmarknaðinum farvæl. Tey uppliva at tey hava førleika til eitt og hvørt arbeiði, tó at tey ikki verða brúkt á arbeiðsmarknaðinum. Tey eftirløntu uppliva somuleiðis at hava væl minni av peningi til dagsins uppihald.

Er tíðin komin til nýhugsan?

Tá ið ein fær eitt prát við fólk, sum røkka eftirlønaraldurin, so kemur ofta framm at hesi vildu fegin hildi áfram í arbeiðsmarknaðinum; men aldurin er ímóti og møguliga er skjótleikin dalandi, ella tað er, at plássini má gerast fyri yngri kreftum, soleiðis eru nú bara umstøðurnar/treytirnar.

Hesi fólk kenna ikki at tey bert kunnu seta seg niður og bína. Tey kenna at tey hava førleika og tíð til eitthvørt arbeiði, sum tey kundu luttikið í.

Um tey funnu sær eitthvørt arbeiði, sum tey kundu luttikið í og tey harvið kundu vunnið sær nakrar eykað krónur, ja so kemur tað almenna Føroyar og knokk-roytur tey fyri hesa gerð.

Tíðin má nú verða komin har teir politisku mynduleikarnir bróta slóð fyri arbeiðsmarknaðinum hjá okkara eftirløntu kvinnum og monnum.

Tað er ein sannroynd at tá fólk fara frá arbeiðsmarknaðinum og ikki hava nakað at taka við, so gongur ikki long tíð áðrenn lívsvirðið er dalandi og ein kennir seg ikki at hava nakað at týða. Tankin um at ein er vrakaður og gloymdur sníkjur seg inn.

Vit eiga ikki at gloyma at tey, ið ynskja at verða virkin og sum eftir førleika og evnum als ikki eru tí almenna Føroyum til byrðu. Heldur tvørtur ímóti. Tað hevði ikki verið av leið, at hesi, sum hava tænt okkara landi, fingu eitt herðaklapp frá okkara politikkarum og tí almenna Føroym. Eingin eykað skattarokning - eingin mótrokning í eftirlønini.

Eg hugsi um teir mongu av okkara sjómonnum, sum hava starvast á sjónum og hava ført mangan ein fongin til landið, men sum av einhvørjari orsøk ikki kunnu fara til skips aftur. Tað eru óivað fleiri av teimum ið kundu hugsa sær at flota bátin ella fari at egna nakrar stampar.

Ella tað kunnu verða kvinnur, sum meta at tær kunnu taka eitthvørt smáarbeiði uppá seg, so tær ikki heilt steðga upp og uppliva at eingin hevði brúk fyri teimum longur.

Hugsa verður somuleiðis um tey hjún ella einlig, ið sita í stórum húsum og sum nú gott kundu hugsa sær at leiga ein part av húsinum út. Um vit hugsa um Suðurstreym, serstakliga her í Havnini, so hevði hetta bøtt um húsa- og leigutørvin.

Man ikki tíðin vera búgvin til nýhugsan á hesum økinum?!

Miðflokkurin vil ganga miðvíst inn fyri at endurskoða eftirlønarskipanina og gera hana meira brúkaravinarliga sinnaða.

Hvat vinna vit við hesum?

Tey eftirløntu verða nøgd. Tey uppliva eitt gott sosialt umhvørvi. Tey kunnu verða tí stóra hjálp fyri tey, ið hava tørv á at tey útinna eitthvørt arbeiði. Fyri tað fáa tey útgoldið nakrar krónur og so er ikki neyðugt at verða bangin fyri at tað nervar eftirlønina. Eftirlønarmóttak-ararnir kunnu fáa útgoldnan pening uttan at skula gjalda skatt.

Miðflokkurin vil altíð stremba fram ímóti at samfelag okkara verður eitt gott samfelag at búgva í.

Vit vilja arbeiða fyri at allir bólkar í samfelagnum, skulu kenna gleði við at útinna dagsins verk.

Við at tú setur ein sterkan Miðflokk inn á ting tann 20. januar so verður tú við til at mynda Føroyar eftir valið. Vel lista H.